# Mentanarnáttin 2004
## 4. juni 2004

*Mentanarnáttin verður sett á Vaglinum kl. 18.*
*Harmoniorkestrið GHM spælir og*
*Havnarkórið syngur.*
*Finnur Johansen setur kvøldið*

**Handlarnir í Miðbýnum hava opið til kl. 23.00, og í SMS til kl. 24.00**
**Miklagarður og Keypssamtøkan steingja kl. 20.00**

*Stuðlað hava: Flogfelag Føroya – Føroya Banki – Føroya Sparikassi – Føroya Tele – Suðuroyar Sparikassi*

### Hvar hendir tað

| | | |
|---|---|---|
| Boysensgarður | Kl. 18-23 | Havin hjá Gl. Bókhandli er opin. Portrið er vestanfyri við gomlu Perluna |
| | Kl. 20.00 | Konsert við Tórshavnar Kamarkór |
| Café Natúr | KL. 22.00 | Livandi tónleikur |
| Gallarí Focus | Kl. 14-22 | Framsýning við Hansinu Iversen og Vígdis Petersen |
| Føroya Listasavn | Kl. 11-17 | Savnið er opið. Serframsýning v. Astri Luihn |
| Gl. kommunuskúlagarð | Kl. 15.00 | Jan Christiansen, borgarstjóri, tekur ímóti barnagarðsbørnunum. Børnini kvøða |
| Gongugøtan | Kl. 17-22 | Ljósið og Tórshavnar Kamar hava básar |
| | Kl. 21.00 | Ljósið hevur fimleikauppvísing |
| Grasagarður | Kl. 12.00 | Havnin, ein býur har børnini trívast. Børnini syngja í Grasagarði |
| | KL. 13.30 | Ganga børnini í skrúðgongu gjøgnum býin oman til Býráðið |
| | Kl. 15-20 | Lutir og litir renna millum runnar. Tilhaldið skipar fyri framsýning av turrikløðum. |
| | Kl. 15.30-22.00 | Konsert við bólkum frá Tórshavnar Musikkskúla |
| | Kl. 15.30 | Spælistovutyrlan |
| | Kl. 16.00 | Barnakórið úr sangleikinum Jósef |
| | Kl. 16.30 | Ung Stjørnuskot |
| | Kl. 17.00 | Junior Big Band |
| | Kl. 17.30 | Tórshavnar Ungdóms Harmoniorkestur |
| | Kl. 18.00 | steðgur |
| | Kl. 19.30 | Paradox |
| | Kl. 20.00 | Almost Unplugged |
| | Kl. 20.30 | Toxic |
| | Kl. 21.00 | Take five flutes |
| | Kl. 21.30 | Havnar Big Band |
| Havnar Kirkja | Kl. 18-21 | Kirkjan er opin |
| | Kl. 21 | Konsert við Føroya Klarinettorkestur. |
| Havnar Hornorkestur | Kl. 18-21 | Havnar Hornorkestur hevur opið hús í nýggju hølum teirra í Tórsgøtu |
| Hotel Hafnia | Kl. 18-22 | Búff-tilboð á kr. 145,00 |
| Leikhúsið Gríma | Kl. 21.00 | Not kabarett. Atgm. á 125,00 |
| Manhattan | Kl. 22.00 | Livandi tónleikur |
| Móttøkuhúsið | Kl. 18-23 | Høvi verður at síggja málningasavnið í Tórshavnar Móttøkuhúsi og Myndasavni, Tróndargøta 42 |
| Náttúrugripasavnið | Kl. 11-22 | Upphav Føroya, nýggj spennandi framsýning |
| Náttúrugripasavnið | Kl. 17-20 | Plantufrøðiligi urtagarðurin: Fólk eru í urtagarðinum frá kl. 17-20. |
| Norðurlandahúsið | Kl. 22.00 | Summarframsýningin 2004 letur upp. 8 føroysk listafólk vísa fram list sína. |
| Odd Fellow | Kl. 19-23 | Odd Fellow Ordanin í Tórshavn letur hurðarnar upp. Mentanarnáttin 2004 bjóðar losja nr. 1 Ambólturin, IOOF øllum áhugaum at vitja losjuna á Grønlandsvegi nr. 56. Øll eru hjartaliga vælkomin at seta spurningar viðvíkjandi losjuni |
| Platform | Kl. 23.00 | Salsashow og stutt ókeypis salsa-skeið |
| Sjónleikarhúsið | Kl. 23.00 | Føroyskur dansur |
| Smiðjan í Lítluvík | Kl. 18.30-22.00 | Framsýning við gomlum myndum og amboðum hjá Tórshavnar Sløkkjulið |
| Skálatrøð | Kl. 18.30 -22.00 | 1 brandbilur og stigabilurin verða sýndir fram og fólk sleppa at royna at sløkkja eld við eldsløkkjara |
| Skansapakhúsið | kl. 19,20 og 21 | Rundvísing í gomlu bygningunum úti á Tinganesi |
| SMS Torgið | Kl. 16-24 | Atgongumerkjasøla til G! festivalin |
| SMS Pallurin | Kl. 16.00 | Suðurættin spælir lættan summartónleik |
| | Kl. 17.00 | Angela og Hannibal undirhalda |
| | Kl. 18.00 | Saxarnir spæla |
| | Kl. 19.00 | Tórhavnar Kamarkór |
| | Kl. 20.00 | Brot úr Sangleikinum Jósef og dreymakotið |
| | Kl. 21.00 | Upplestur |
| | Kl. 22.00 | Brot úr Sangleikinum Jósef og dreymakotið |
| | Kl. 23.00 | Tingeyingakórið úr Íslandi syngur |
| Snarskivan | Kl. 18-23 | Málningaframsýning hjá Høgna Larsen |
| Tinganes-Reyni | Kl. 18.30 | Gongutúrur við ferðaleiðara í gamla býarpartinum. Byrja verður frammanfyri Gl. Bókhandli. Kostnaður kr. 40,00. |
| | Kl. 20.00 | Verður sami túrur, byrja verður úti í Tinganesi |
| Vaglið | Kl. 18.00 | GHM spælir og Havnarkórið syngur. Finnur Johansen setur mentanarnáttina |
| | Kl. 23.00 | Mentón skipar fyri konsert við ymsum bólkum |
| Vertshúsið | Kl. 22 | Syngið við - ??spælir gamlar kabaretsangir. |

### Nær hendir tað

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 11- 22 | Náttúrugripa-savnið | Náttúrugripasavnið er opið |
| Kl. 15-20 | Náttúrugripa-savnið | Plantufrøðiligi urtagarðurin: Fólk eru í urtagarðinum frá kl. 15-20. Smáar føroyskar plantur til sølu, avmarkað nøgd. |
| Kl. 16-23 | Smiðjan í Lítluvík | Framsýning við myndum úr søgu Tórshavnar Sløkkuliðs |



**UTTAN ÚR HEIMI**

# ES-andstøðingar stóra framgongd í Bretlandi

**Bretski loysingarflokkurin, sum er fyri at taka Bretland úr ES, kann gerast tann stóri vinnarin á valinum til ES-tingið í næstu viku**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

United Kingdom Independence Party hevur lagt eina bumbu undir bretska valið til ES-tingið, sum verður í næstu viku.

Fremsta andlitið hjá loysingarflokkinum er tann kenda filmskvinnan Joan Collins. Tey flestu hava gjørt gjøldur burtur úr flokkinum, men tey hava broytt hugsan eftir eina veljarakanning hjá blaðnum The Daily Telegraph. Kanningin vísti, at hevði parlamentsval verið í Bretlandi nú, hevði loysingarflokkurin fingið fimm prosent av atkvøðunum. Men ikki minni áhugavert var tað, at flokkurin kann fáa næstan 20 prosent av atkvøðunum á valinum til ES-tingið í næstu viku.

Politiskir eygleiðarar í Bretlandi siga, at andstøðan ímóti ES er vaksin nógv ta seinastu tíðina. Teir konservativu hava ongantíð dult fyri, at teir eru ímóti ov tøttum samstarvi í ES, og tí eru teir ímóti teirri ætlaðu grundlógini hjá samveldinum. Í einari sjónvarps-samrøðu týsdagin segði formaðurin í konservativa flokkinum, Michael Howard, at hann vil ikki hava ES-grundlógina.

– Tað eru bara tjóðir, sum hava eina grundlóg. Eg vil ikki vera borgari í einum landi, sum eitur Evropa, segði Howard. Hann ávaraði samstundis veljararnar ímóti teimum víðgongdu, sum annaðhvørt vilja hava Bretland úr ES, ella sum vilja hava Bretland sum ein part av einukm evropeiskum ríki.

# Nú tekur Mandela seg aftur

*Nelson Mandela tekur seg nú aftur av altjóða pallinum*



**Nú verður minni at síggja til tann 85 ára gamla Nelson Mandela**

SUÐURAFRIKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Aftan á eitt langt lív sum fremsti maður í suðurafrikanska frælsisstríðnum hevur Nelson Mandela gjørt av at taka seg aftur av altjóða pallinum. Hann segði við BBC fyrradagin, at í framtíðini verður hann ikki so nógv at síggja longur.

Nelson Mandela sat 27 ár í fongsli, og hvørt mansbarn kring heimin kennir hann sum undangongumannin í stríðnum ímóti apartheid-stýrinum í Suðurafrika. Í 1994 gjørdist hann tann fyrsti svarti suðurafrikanski leiðarin, og í 1999 gjørdi hann av at taka seg úr forsetaembætinum. Tey seinastu fimm árini hevur Mandela verið virkin í ymsum vælgerðararbeiði, eitt nú stríðnum ímóti eyðkvæmi.

Men nú ætlar hann sær at njóta tíðina saman við sínum næstu. Men hann ætlar sær ikki at tiga. Við BBC segði hann, at hann ætlar sær framvegis at gera vart við skeivleikar í heiminum, eins og hann javnan hevur gjørt tey seinastu árini.

## Færri doyðu í ferðsluni

Í fjør doyðu 280 fólk í ferðsluni í Noregi, og tað var 30 færri enn í 2002, skrivar Aftenposten.

Hagtøl hjá norsku hagstovuni vísa, at árini frá 1994 til 2003 doyðu 301 fólk í meðal í ferðsluni um árið, og at 1229 fólk fingu stóran skaða í ferðsluóhappum í hesum sama tíðarskeiðinum. Men eisini hetta talið var minni í fjør enn onnur ár. Í fjør fingu 994 álvarssaman skaða á teimum norsku vegunum.

Tað eru ikki bara fólk í bili, sum doyggja í norsku ferðsluni. Sambært hagstovuni í Oslo doyðu 14 fólk á súklu í fjør, og tað var tvey meiri enn árið fyri. Nógvar vanlukkur við motorsúklum vóru eisini, og í fjør 37 fólk í vanlukkum við motorsúklum. Tað er heldur ikki vandaleyst at ganga á ella fram við vegunum. 33 fólk doyðu, eftir at tey komu fyri bilar á norsku vegunum í 2003.

## Kanna skuldsetingar

Myndugleikarnir í suðuramerikanska landinum Uruguay eru farnir at kanna skuldsetingar um, at uruguaysnkir hermenn skulu hava misnýtt ungar gentur, tá teir gjørdu tænastu í Kongo sum ST-hermenn.

Løgreglan í Kongo hevur fingið fráboðanir um, at í hvussu er tólv hermenn úr Uruguay hava neyðtikið ungar kongolesiskar gentur, og at summar teirra vóru ikki meiri enn tólv ára gamlar. ST, sum hevði ábyrgdina av hermonnunum, hevur gjørt av at kanna skuldsetingarnar, og nú hava myndugleikarnir í Uruguay gjørt av at gera tað sama. Tað eru ikki bara hermenn úr Uruguay, sum verða lagdir undir at hava misnýtt ungar gentur í Kongo. Eisini fleiri ST-hermenn úr Marokko eru lagdir undir at hava misnýtt gentur, tá teir vóru Í Kongo, men enn hava teir marokkonsku myndugleikarnir ikki sagt nakað um, hvørt teir fara at kanna skuldsetingarnar ella ikki.

10.800 friðarvarðveitandi hermenn og 60 onnur starvsfólk hjá ST eru í Kongo, har tey royna at verja sivilfólkið ímóti ófriðarkroppum.

## Tjóvar á vegunum

Seinastu árini hava tjóvar gjørt um seg á teimum svensku vegunum, og seinasta vikuskiftið gjørdu teir aftur vart við seg.

Hesaferð gjørdu tjóvarnir seg inn á fýra fólk úr Eysturríki, sum høvdu lagt seg at sova í bilinum tætt við Torpasjøen sunnan fyri Kungsbacka. Í einum ryggsekki, sum eysturríkararnir høvdu standandi á setrinum framman, funnu tjóvarnir 20.000 krónur, sum teir tóku við sær. Harumframt tóku teir passini og bankakortini frá teimum fýra.

Teir fýra eysturríkararnir vóru á veg til Noregs, men nú teir hvørki høvdu pass ella pengar hildu tey seg ikki hava annað í at velja enn at fara heimaftur. Svenska løgreglan sigur, at teir sokallaðu vegatjóvarnir hava ikki gjørt so nógv um seg higartil í ár, men nøkur rán hava kortini verið. Sambært svensku løgregluni gera tjóvarnir seg serliga inn á útlendsk ferðafólk, sum steðga á ella leggja seg at sova við vegirnar.

## Kenna ikki D-dagin

Ein spurnarkanning í Daily Mirror avdúkar, at tey ungu í Bretlandi hava ikki serliga góðan kunnleika til landsins søgu.

Tá blaðið spurdi sínar ungu lesarar, hvat tey vistu um D-dagin, vísti tað seg, at 73 prosent vistu als ikki, hvat hetta er fyri dagur, nær hann var, ella hvat hendi tað. Bara seks prosent vistu, at D-dagurin var, tá teir sameindu gjørdu landgongd í Fraklandi tann 6. juni í 1944 ella fyri 60 árum síðani, og hvørjir leiðararnir í Bretlandi, USA og Týsklandi vóru tá.

Ein 20 ára gamal maður svaraði Daily Mirror, at D-dagurin var í 1962, og ein javnaldur hansara vildi vera við, at Tony Blair var forsætisráðharri í Bretlandi D-dagin.